## Skulu tosa grønlendskt í Landstinginum



Í Grønlandi hevur andstøðuflokkurin Siumut skotið upp, at tingmenn og landsstýrismenn skulu tosa grønlendskt, tá teir fara upp á røðarapallin í Landstinginum. Í dag fekk flokkurin unsirtøku frá fakfelagnum SIK. Formaðurin í felagnum, Jess G. Berthelsen, sigur við fjølmiðlarnar, at 30 prosent av tí grønlendska fólkinum tosa bara grønlendskt, og at hesi ofta verða sett til viks í teirri almennu kunningini. Eftir uppskotinum hjá Siumut skulu tær nýggju málreglurnar koma í gildi í 2013. IA, sum nú situr í samgongu, hevur fyrr talað fyri, at á tingsins røðarapalli skulu fólk tosa grønlendskt.

## Ovfiska rækjustovnin

Á hvørjum ári veiða skip nógv meiri rækjur í grønlendskum sjógvi, enn vísindin heldur vera ráðiligt. Grønlandsposturin skrivar, at grønlendsku rækjuskipini fiska munandi meiri, enn fiskifrøðingarnir hava mælt til, og tað hevur sambært blaðnum havt við sær, at rækjustovnurin gerst minni og minni, sum árini ganga. Grønlandsposturin skrivar, at í tíðarskeiðinum frá 2004 til 2008 vat tilmælið hjá fiskifrøðingunum, at veiðan mátti ikki fara upp um 630.000 tons. Kortini fór veiðan upp um 760.000 tons ella 21 prosent oman fyri tilmælið frá vísindini, skrivar blaðið.

# Hýsan burðardygg um tvey ár

**Sambært Jákupi Reinert, fiskifrøðingi, kann hýsuveiðan verða burðardygg um tvey ár, um eins nógv verður veitt, sum tað verður í dag**

FISKIDAGAR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Sambært Jákupi Reinert, fiskifrøðingi og leiðara á fiskideildini hjá Havstovuni, hava smábátarnir stóra ávirkan á fiskin kring Føroyar*

Jákup Reinert, fiskifrøðingur og leiðari á fiskideildini á Havstovuni, staðfestir, at í løtuni verða ikki ov nógvar hýsur tiknar út stovninum í mun til ásetingina hjá ICES, at 20 prosent kunnu takast úr stovnunum.

Trupulleikin er hinvegin við burðardygd, at gýtingarstovnurin skal vera oman fyri eitt ávíst lívfrøðiligt minstamark, og tað var hann ikki við seinastu stovnsmeting, ið varð gjørd í 2009.

– Gýtingarstovnurin er ov lítil, men við verandi veiðutrýsti kann hýsuveiðan verða mett at vera burðardygg um ein tvey ár, sigur Jákup Reinert, og leggur afturat, at tað er av týdningi, at hýsan veksur væl í vekt fyri tíðina.

Hann vísir tó eisini á, at so skjótt nakað av toski verður at fáa, so verður eisini størri partur av hýsuni veiddur.

Toskurin er um at koma fyri seg, og hetta kann tí ávirka hýsuna.

– Men fyri bæði tosk og hýsu er galdandi, at dagatalið hjá flotanum er ov stórt, og fyri at toska- og hýsuveiðan eisini upp á sikt kunnu vera burðardyggar, so er neyðugt at stilla dagatalið, so at tað gerst hóskandi.

– Tað hevði hjálpt at tikið dagarnar burtur, sum komu ov nógvir inn í fiskidagaskipanina, beint eftir hon var gjørd, sigur fiskifrøðingurin.

Men vísir á, at tað er sera óvíst, um tað er nóg mikið, tí tá varð miðað eftir, at tað í miðal skuldu fiskast eini 33% í tali burtur úr stovnunum av ávikavist toski, hýsu og upsa. Hetta er í meira lagi fyri toska, og alt ov nógv fyri upsa og serliga hýsu.

Hetta er í tráð við tað, sum Reiðarafelagið vísir á sum ein møguleika.

Tað merkir nevniliga, at bátarnir undir 15 tons skulu missa ein stóran part av døgum sínum.

– Fólk hava ta fatan, at smábátar ikki kunnu ávirka nakran stovn. Men um royndin hjá teimum er ov stór, so er tað sjálvandi ikki rætt, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur.

# Fiskimálaráðharrin vil regulera í fiskidagaskipanini

**Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, vil ikki koma við nakrari konkretari loysn, men staðfestir, at tað verður viðgjørt, hvussu fiskidagaskipanin kann rættast**

FISKIDAGAR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, staðfestir, at ráðið í løtuni arbeiðir við at tillaga fiskiskapin kring Føroyar, men enn er onki heilt klárt*

Bæði vinna og serfrøði eru so at siga samd um, at politiska skipanin má gera rættingar í fiskidagaskipanini, men Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, vil bert siga, at tað verður arbeitt við málinum.

Um hugsanina hjá Auðunn Konráðsson, formanni í meginfelag útróðrarmanna, sum í tíðindunum á Rás2 í gjár, staðfesti, at tað kann geva teimum, sum liva av fiskivinnum trupulleikar, at hvør fjøl fer á flot, tá nakað er at fáa, og hugsanina hjá Viberg Sørensen, formanni í Reiðarafelagnum, sum merkir, at dagarnir hjá bátunum undir 15 tons mugu skerjast.

Umframt spurnarteknið á heimasíðuni hjá reiðarafelagnum, um tað er rætt, at tað er so rúmsátt í tí bólkinum, at hvør maður kann fara á flot hvørja ferð stovnurin kemur fyri seg, sigur Jacob Vestergaard, at hann illa dugir at ímynda sær, at tey, sum partvíst hava vinnuveg at fara til útróðrar, skulu missa hendan rættin.

– Eg havi sagt, at í Føroyum eigur mann at sleppa á flot, sigur Jacob Vestergaard, men viðgongur, at tað eisini verður hugt uppá, hvussu hetta skal skipast.

### Vil stongja øki

– Vit arbeiða við ymiskum møguleikum, og ein er at stongja ymisk øki, har smáfiskur er. Ongin er heldur áhugaður at fiska gillur, sigur landsstýrismaðurin.

Hetta kann setast útsagnir frá Havstovuni, sum vísir á, at nógvur smátoskur verður tikin við Føroyar.

Hinvegin heldur landsstýrismaðurin, at smáu bátarnir hava lítla ávirkan á hýsuna og vísir til hagtølini seinastu árini.

– Tað eru línuskipini, sum fara við mestu hýsuni, sigur Jacob Vestergaard.